# Grundøkir á Sandvíkahjalla





Ovast á vinnuøkinum á Sandvíkahjalla lýsa vit við hesum tvey óbygd grundøkir til sølu.

Matr. nr. 1 oq, Hoyvík: 7.484 m²

Matr. nr. 2 or, Hoyvík: 3.648 m²

Stykkini liggja lið um lið og kunnu tí seljast saman ella hvørt fyri seg. Tey eru planerað, innigird og liggja væl fyri.

Sambært byggisamtyktini liggja stykkini í 3. grundumráði B7 vinnuøki, sum kann nýtast at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur o.t. og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við.

Áhugað kunnu venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

**Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

# Suðuroyingar!

Alt VVS-arbeiði verður gjørt skjótt og fyri rímuligan prís.

Orkusparandi Thermomatic oljufýr fáast nú fyri einans kr. 3.200.

**Sp/f Poul Hammer**
**Tlf. 372003 / 282941**

**Lesið sosialin**

# Trøð til sølu



Vit selja eina trøð í Havnardali. Trøðin er 12.930 m². Sambært byggisamtyktini liggur trøðin í 4. grundumráði, sum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Servituttir eru eisini tinglýstir á ognini, millum annað at trøðin ikki kann útstykkjast uttan býráðsins samtykt.

Áhugað kunnu venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

**Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

# Tímalærari til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærara/um í

**støddfrøði á C og B-stigi (5+5 t/v)**

at byrja á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna 1. august 2000.

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinini.

Tímarnir verða løntir samsvarandi tímalærarum á studentaskúla og HF-skeiðunum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella á Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av prógvskjølum v.m. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 9. juni 2000.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

# Leiðari

Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður søkir leiðara at byrja aftaná summarfrítíðina ella eftir avtalu.

Vit bjóða eitt áhugavert starv á einum stovni við sera góðum plássi innandura og eru góðir møguleikar fyri at royna nýggjar hugsanir. Starvsfólkini hava starvast her leingi og gleða seg og eru positiv fyri nýggjum íblástri.

Stovnurin er normeraður til 60 børn í 3 til 7 ára aldri. Vit hava pedagogar í øllum pedagogstørvum. Tveir av pedagogunum eru settir í starv í ár. Tað er ikki ein treyt at duga rokniskap. Møguleiki er at seta fólk til hetta arbeiði.

Leiðarin skal hava pedagogiska útbúgving. Um ongin við pedagogiskari útbúgving søkir kann leiðari við aðrari relevantari útbúgving verða settur í starv fyribils. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við viðmælum og møguligum prógvum skulu sendast nevndini innan 20. juni 2000.

**Nevndin fyri**
**Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarð**
Jónas Patursonargøta 13
100 Tórshavn

# Blákrossheimið søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir fólki við hóskandi útbúgving til Blákrossheimið at byrja 1. august 2000.

**Hóskandi útbúgving:**
Sosialráðgevi
Lærari
Sjúkrasystir
Diakon
Pedagogur

Tað er eisini ein fyrimunur, hevur tú eina terapeutiska útbúgving og royndir innan rúsdrekkaviðgerð.

Starvið umfatar í høvuðsheitum viðgerð av rúsevnismisnýtarum. Harumframt eru nøkur praktisk ábyrgdarøki knýtt til starvið. Roknast kann við kvøld- og vikuskiftisvaktum.

Ein treyt er, at viðkomandi gongur inn fyri blákrosshugsjónini, sum bygd er á kristið grundstøði.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi sum skjótast, ella í seinasta lagi 1. juni 2000.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til leiðaran Sólborg Dulavík á tlf. 315575.

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12, Tórshavn

*Fartelefonir*

S/f Teldu Tænastan — www.tt.fo

Staravegur 5 - Postsmoga 1144 - FO-110 Tórshavn - Tlf.: 317620 - Fax: 317699



# Umsóknir
## um stuðul til uppihaldspening

Víst verður til løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 1997 um stuðul til uppihaldspening.

Rætt til stuðul hevur:
1) persónur, sum tí almenna er álagdur at gjalda uppihaldspening til hjúnafelaga, skildan ella sundurlisnan, og
2) persónur, sum av tí almenna er álagdur at gjalda uppihaldspening til børn yngri enn 18 ár, og sum ikki búgva hjá uppihaldsskylduga.

Stuðulin er treytaður av, at umsøkjarin er undir fullari skattskyldu og búsitandi í Føroyum.

Tann árliga stuðulshæddin er 50% av tí uppihaldspeningi, sum persóni er álagt at gjalda, og sum er goldin.

Um ein persónur fær ella hevur fingið endurgjald á annan hátt fyri útreiðslur til uppihaldspening, hevur hesin persónur samstundis ikki rætt til stuðul eftir hesi lóg.

**Stuðulin verður útgoldin í juni mánaða. Stuðulin verður bert veittur eftir umsókn fyri hvørt hálvárligt útgjald. Viðleggjast má kvittan fyri goldnan pening ella má umsøkjarin útvega uppgerð frá Toll- og Skattstovu Føroya.**

**Umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 09.06.2000.**

Umsóknarbløð fáast frá øllum deildum Almannastovunnar.

Umsóknin skal sendast til Almannastovuna, Jónas Broncksgøtu 27, 100 Tórshavn.

**Almannastovan**

# Maskinførari

Søkt verður eftir maskinførara til støðugt arbeið at byrja beinanvegin.

**P/f Guttesen og Staksberg**
**Tlf. 313495**

# Randarhús Millum Gilja

Um hóskandi boð fæst verða eini randarhús Millum Gilja lýst til sølu. Húsini eru bygd í 1988/89, hava krúpikjallara, 2 hæddir og loft.

Stovuhæddin er 69 m², miðhæddin er 59 m² og loftið er 30 m². Grundøkið er 232 m² til støddar. Gjørt er framman og aftan fyri húsini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøta 9**
att.: Fríða Patursson, adv

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

# SUÐURGARÐ
## nýggjur handil á Skála

Vit eru einaumboð fyri fleiri fyritøkur í Danmark. Fjølbroytt úrval. Klæðir til vaksin og børn, videofilmar, tilhoyr til fartelefonir, møblar, eykalutir til súkklur, ymisk reinsievni til íðnaðin, pallulyftarar, trukkar, veitslutaskur, smykkur, turriklæði o.m.a.

Handlandi eru vælkomin at vitja okkum og síggja kollektiónirnar.

Vinarliga ring áðrenn og avtala tíð.

**Privatsøla**
Júst nú hava vit keypt nakað av vørum heim, sum verður selt í smásølu til privat, til dømis summarsandalir, babyklæði, barnaklæði, klæði til ungar gentur og til damur, turriklæði, smykkur o.m.a.

Vit keypa øðrvísi inn, tí lægri prísir. Tú sparir frá 20–50%.

*Kom og ger kvettið.*

Opið fyri privatum hósdagin 25.5. og fríggjadagin 26.5. frá kl. 14.00–18.00 og leygardagin 27.5. frá kl. 10.00–14.00.

Vit halda til við høvuðsvegin á Skála (um tú kemur frá Skálabotni, koyr gjøgnum bygdina til tú kemur til Prestá, so 3. hús á høgru hond).

**Suðurgarð**
**480 Skála · Tlf. 441728 · Fartlf. 221684**

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Avensis 4-H-Sedan
**Árg.:** 1995
**KM:** 83.083
**Eyka útstýr:** El-rútar, sentrallás, 5 gear, ABS

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú til hægstbjóðandi. Bilurin stendur hjá Reyni Service.

Boð skulu latast inn til sýnsmann.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Magna Petersen
tlf. 34 57 28 - 21 57 28
fax nr. 34 56 07
at hitta millum kl. 14.30–16.00.

# Frítíðaravloysari

**søkist beinanvegin til Safari Transport. Møguleiki er fyri føstum starvi. Ring og hoyr meira.**

**SAFARI TRANSPORT tel. 322222**
www.safari.fo

Sosialurin - 311820

# Fiskadjóralækni

Hjá Landsdjóralæknaembætinum er eitt starv sum fiskadjóralækni leyst at søkja, at byrja 01.08.2000 ella skjótast gjørligt, eftir avtalu.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávur hjá fiskadjóralæknanum koma millum annað at fevna um luttøku í fyrireikandi arbeiðinum hjá Landsdjóralæknanum á fylgjandi umráðum:
- Ráðlegging og stovnseting av eini fiskapatologiskari starvsstovu komandi 1 1/2-2 árini. Sambært fyribils ætlanum verður fiskapatologiska starvsstovan mannað við 2 djóralæknum/fiskaheilsukandidatum og 2 laborantum. Starvsstovan skal kunna nýta teir grundleggjandi arbeiðshættirnar innan fylgjandi vísindagreinir: obduktión, parasitologi, mikrobiologi, virologi, serologi og histologi.
- Dagføring av lóggávuni um sjúkur hjá dýrum, her undir alifiski.
- Stovnseting av heilsuskráum fyri alifisk og sláturlinjueftirlit í sambandi við tøku/slakt av alifiski (fra fjord til bord strategi).

Tá fiskapatologiska starvsstovan er stovnsett, kemur høvuðsuppgávan hjá fiskadjóralæknanum at fevna um fylgjandi:
- Dagligu ábyrgdina av eini ella fleiri av fylgjandi vísindagreinum: obduktión, parasitologi, mikrobiologi, virologi, serologi og histologi og av teimum starvsstovukanningum, sum skulu gerast í sambandi við heilsuskráir fyri fisk.
- Menning av nýggjum mannagongdum av nýggjum arbeiðshættum innan viðkomandi vísindagrein.
- Ráðgeva starvandi (praktiserandi) fiskadjóralæknum og fiskaalarum um heilsuskráir og um niðurberjing av sjúkum hjá alifiski. Arbeiðið á fiskapatologisku starvsstovuni kemur at fevna um nært samarbeiði við starvandi (praktiserandi) fiskadjóralæknar.

Umframt hetta koma arbeiðsuppgávurnar hjá fiskadjóralæknanum at fevna um virksemi, sum hoyrir undir Landsdjóralæknaembætinum:
- Loyvir og váttanir í sambandi við innflutning og útflutning av djórum, úrdráttum av dýrauppruna og av matvørum.
- Djóralæknafrøðiligt (veterinert) kjøteftirlit.
- Eftirlit við sóttverju fyri dýr.
- Umsiting og tilsjón sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi lóggávu viðvíkjandi djóralæknum, sjúkum hjá dýrum dýravælferð (trivnaði hjá dýrum).
- Aðrar umsitingarligar uppgávur, sum hoyra Landsdjóralæknaembætinum til.

**Setanarumstøður**
Fiskadjóralæknin verður settur í starv undir Landsdjóralæknaembætinum, sum er ein stovnur undir Vinnumálastýrinum. Landsdjóralæknaembætið hevur skrivstovu á Tinganesi í Tórshavn, har fiskadjóralæknin somuleiðis kemur at halda til fyribils.

**Lønarviðurskifti**
Fiskadjóralæknin verður løntur sambært galdandi sáttmála fyri Magistarafelag Føroya.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður í starv sum fiskadjóralækni, skal hava útbúgving sum djóralækni/veterinerur frá einum av teimum norðurlendsku londunum ella hava eitt djóralæknaprógv, sum kann javnsetast við djóralæknaútbúgving.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi hevur fakligar royndir og postgraduata útbúgving innan eina ella fleiri av hesum vísindagreinum: fiskapatologi, mikrobiologi og virologi á Ph.D. støði ella kliniskar royndir, sum kunnu javnsetast við hesar.

**Umsókn**
Umsókn til starvið verður at senda til: **Landsdjóralæknin, Tinganes, Postsmoga 139, FO-110 Tórshavn**, innan 01.07.2000. Við umsóknini skulu leggjast prógvskjøl og Curriculum Vitae.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til **landsdjóralækna Bjørn Harlou, tlf. 322600.**